# Heilsuverkið í Føroyum - læknamanningin og fíggjarlógarjáttanin - samanborið við onnur lond

**Læknafelag Føroya**
**Pál Weihe, formaður**
**pal@health.fo**
**216696**

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ........ 2
Uppgávan frá Læknafelagnum ........ 3
Arbeiðsháttur ........ 3
Tilfar ........ 3
Avbjóðingar ........ 3
Heilsuútreiðslur ........ 3
Læknatal ........ 4
Læknamanning ........ 5
Niðurstøða um læknamanning í Føroyum samanborið við onnur lond ........ 7
Fíggingin av Føroyska Heilsuverkinum ........ 7
Niðurstøða ........ 10
Keldulisti ........ 11
APPENDIX ........ 13

# Uppgávan frá Læknafelagnum

Læknafelag Føroya hevur rópt varskó, tí felagið heldur, at politikararnir mugu gera sær greitt, hvat tað er fyri eitt heilsuverk vit vilja hava, og teir mugu gjalda tað, sum tað fer at kosta. Læknafelagið heldur, at vit hava alt ov fáar serkønar læknar og hevur ta forsøgn, at heilivágur og neyðuga tøknin fer at gerast alsamt dýrari. Eitt heilsuverk má uppbyggjast við tolni yvir langa tíð, men kann forkomast eftir stuttari tíð, um ov nógv kvalifiserað starvsfólk fara og serligir førleikar hvørva. Fyri at geva politikarum eitt metingargrundarlag hevur Læknafelagið heitt á Gyðu Skaale Johansen, MA in management og MBA í International Health Care Management, um at gera eina kanning, soleiðis at vit kunnu samanbera lækna-manningina og kostnaðin av føroyska heilsuverkinum við Danmark og onnur lond. Hennara frágreiðing er hendan:

## Arbeiðsháttur

### Tilfar

Tá vit í Føroyum samanbera okkum við onnur lond, hyggja vit al oftast til Danmarkar. Fyri at fáa eitt breiðari samanberingar grundarlag í hesari kanning, hava vit valt eisini at hyggja eftir øðrum londum. Í hesum arbeiði hava vit í stóran mun brúkt hagtølini hjá OECD, sum á hvørjum ári ger upp heilsuútreiðslurnar í mongum londum, men serliga londini í Evropa. Vit hava eisini brúkt Health at a Glance: Europe 2014, sum ES kommissiónin og OECD geva út í felag. Síðan 2000 hava flest OECD lond gjørt heilsuútreiðslur upp sambært eini leiðbeining frá OECD: System of Health Accounts manual (stytt SHA). Føroyar brúka ikki SHA í samband við uppgerð av heilsutreiðslunum, men Classification of Functions of the Government (stytt COFOG), sum er ein annar frymil, ið bert fokuserar á almennar heilsuútreiðslur. Í hesi frágreiðing eru COFOG-útreiðslur brúktar sum grundarlag til samanberingar, tí vit hava ikki greiðar og tøkar upplýsingar um privatar heilsuútreiðslur í Føroyum.

Læknatalið í Føroyum verður í NOMESCO (Nordic Medico-Statistical Committee) gjørt upp í ársverkum, íroknað konsulentar. Í hesi frágreiðing hava vit fingið til vega læknatalið frá sjúkrahúsunum, frá Heilsutrygd og frá Læknafelagnum. Samanberingar eru so gjørdar við onnur Norðurlond og ES (NOMESCO og OECD). Vit hava eisini fingið tøl frá Hagstovu Føroya, Statistikbanken í Danmark og Hagstofa Íslands. Ymisk hagtøl eru fingin til vega við beinleiðis fyrispurning til stovnar. Árligu frágreiðingarnar frá NOMESCO hava verið serliga hentar til at finna upplýsingar um Norðurlond í.

## Avbjóðingar

### Heilsuútreiðslur

Tað er trupult at samanbera lond, tá ið tað kemur til heilsuútreiðslur. Partvíst tí at londini hava heilsuskipanir, ið eru ymiskar, og partvíst tí at tað er munur á, hvussu ymsu londini gera síni heilsuhagtøl upp, t.e. hvat tey telja við sum heilsuútreiðslur.

Tá ið OECD samanber heilsuútreiðslur hjá ymsum londum, nýta tey SHA (System of Health Accounts), og eru tað tøl frá OECD, ið NOMESCO nýtur, tá ið tey samanbera heilsuútreiðslurnar hjá ymsu Norðurlondunum. Bert grønlendsku og føroysku tølini koma beinleiðis úr uppruna landinum, og tølini úr Føroyum koma frá Hagstova Føroya. Hagstova

Føroya nýtir COFOG (Classification Of the Functions of the Government) frymilin, tá ið hon greinar føroysku heilsuútreiðslurnar.

Við tað, at SHA og COFOG eru tveir ymiskir frymlar, ber ikki til at nýta tølini hjá NOMESCO til at samanbera tær norðurlensku útreiðslurnar. Tí eru COFOG útreiðslur hjá hinum Norðan-londunum fingnar til vega frá OECD til samanberingar.

COFOG er ein einfaldur máti at gera upp útreiðslurnar í einum landi, tí her her eru bert tær almennu útreiðslurnar tiknar við – tær sum standa á fíggjarlógini. Tað, sum fólk sjálv gjalda úr egnum lumma beinleiðis til læknar ella tannlæknar, er ikki við, og ei heldur gjald til privatar heilsutryggingar. Sjálvt innanfyri Norðanlond eru heilsuskipanirnar eitt sindur ymiskar, tí í summum londum er tann privati parturin størri enn aðrastaðni. Um føroysku heilsuútreiðslurnar skulu samanberast neyvt við onnur lond við øðrum skipanum, er tað neyðugt at gera upp føroysku útreiðslurnar sambært SHA frymlinum. Men hesi tøl eru ikki til taks í Føroyum. Hinvegin er tann almenni parturin í teimum norðurlendsku vælferðarsamfeløgunum tó tann nógv tann stórsti parturin. Tí eru COFOG heilsuútreiðslurnar í hesum føri mettar at vera rímiligt grundarlag til samanberingar.

## Læknatal

Tølini fyri læknar eru eitt sindur trupul at samanbera, av tí at summi lond brúka fulltíðarstørv, meðan onnur lond brúka tal av persónum.

Í Íslandi rokna tey allar læknar við, ið eru undir 70 ár, sum búgva í Íslandi, og hava rætt til virksemi sum læknar í Íslandi (Hagstofa Íslands, 2015). Hetta talið kann vera misvísandi, av tí at summir læknar kunnu arbeiða niðursetta tíð ella hava meira enn eitt starv.

Síðani 2014 siga donsku læknatølini bæði hvussu nógvir læknar eru í landinum eins og áður, men nú er talið av fulltíðarstørvum eisini roknað út – teir rópa tað "kapacitetir", (Facius K., Trier Poulsen, D., 2015). Um ein telur øll læknastørv í Danmark, t.e. privat praktiserandi læknar (læknar sum hava sáttmála við tað almenna) og sjúkrahúslæknar, verða tað heldur fleiri læknastørv enn talið av læknum, tí summir sjúkrahúslæknar hava annað arbeiði framíhjá.

Tølini frá NOMESCO eru, sambært Terja Petersen, fíggjarstjóra í Heilsumálaráðnum, ein samanrokning av fulltíðar størvum, íroknað konsulentar, meðan tølini fyri kommunulæknar eru grundað á læknaviðtalur. Sambært John Dalsenni Olsen, deildarleiðara í Heilsutrygd, royna tey altíð at hava læknaviðtalurnar mannaðar, men tað kemur fyri, at tær standa ómannaðar partar av árinum, t.d. um høgtíðirnar.

Læknafelagið hevur til hesa kanningina gjørt eina uppgerð yvir læknatalið í Føroyum í august 2015.

# Læknamanning

Í Føroyum vóru sambært Hagstovuni í 2013 105,4 læknar: 29 kommunulæknar og 76,4 sjúkrahúslæknar (Hagstova-Føroya, Heilsumál, 2015). Sambært NOMESCO vóru við konsulentum 113 fulltíðar læknastørv í Føroyum í 2012.
Í 2015 eru 30 kommunulæknaviðtalur. Sambært Heilsutrygd arbeiða 24 kommunulæknar í føstum størvum, og av teimum arbeiða 4 læknar ¾ tíð, og ein lækni arbeiðir hálva tíð, og restin verður røkt av skiftandi avloysarum.

Føroyska læknatalið (fulltíðarstørv) í august 2015 er:

| Lands-sjúkrahúsið | Klaksvíkar Sjúkrahús | Suðuroyar Sjúkrahús | Privat Praktis erandi | Deildin fyri Arbeiðs- og Almanna heilsu | Útb. Starv Almen Medisin | Kommunu-lækna viðtalur | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 65 | 5 | 3 | 2 | 1 | 6 | 30 | 112 |

Tabell 1: Læknatalið í Føroyum. Kelda Læknafelag Føroya

Afturat hesum læknunum eru 41 konsulentar knýttir at Landssjúkrahúsinum, 5 at Klaksvíkar Sjúkrahúsi og 1 at Suðuroyar Sjúkrahúsi, tilsamans 47 útlendskir konsulentar. Hesir eru í starvi aðrastaðnis og koma til Føroyar av og á. Tað er ilt at siga, hvussu nógv fulltíðarstørv hetta hevði svarað til, men vit mugu ganga út frá, at teir eru dýrari fyri hvønn arbeiðstíma enn læknar í føstum starvi. Harafturat koma ferða- og bústaðarútreiðslur. Ein varislig meting er, at tey 47 konsulent størvini vildu svara til, ikki meira enn, 10 fulltíðarstørv – helst minni.

Samanbering við NOMESCO-hagtølini

Seinastu NOMESCO hagtølini í 2014 árbókini eru frá 2012. Sambært Terja Petersen í Heilsumálaráðnum eru føroysku tølini ársverk, inklusiv konsulentar. Í tabellini niðanfyri er talið av íbúgvum fyri hvønn lækna í landinum.

| Ár | Grønland | Føroyar | Áland | Finnland | Ísland | Danmark | Svøríki | Norra |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2012 | 571 | 427 | 342 | 329 | 280 | 276 | 265 | 234 |

Tabell 2: Íbúgvar per lækna, Kelda NOMESCO

Við øðrum orðum hevur ein lækni i Føroyum í miðal 147 fleiri íbúgvar at taka sær av enn ein lækni í Íslandi, 151 fleiri enn Danmark, 162 fleiri enn Svøríki og 193 fleiri enn Norra. Bert í Grønlandi eru tað fleiri íbúgvar fyri hvønn lækna, enn tað eru í Føroyum.

Nýggjastu tølini í Íslandi eru frá 2013 við 1.174 læknum, ið geva 1 lækna per 277 fólk (Statistics-Iceland, 2015).

Í Danmark eru sambært Statens Seruminstitut í 2014 hesi læknaligu ársverk:

- 15.385 læknar á almennum sjúkrahúsum,
- 3.511 kommunulæknar
- 927 serlæknar, ið hava sáttmála við tað almenna (Trier-Poulsen & Facius, 2015)

Hetta gevur samanlagt 19.796 læknar, men eru læknar ikki taldir við, sum arbeiða uttan fyri tann almenna geiran, ella sum ikki hava sáttmála við tað almenna.

Við 19.796 læknum og 5.627.000 (Danmarks Statistik, 2015) íbúgvum gevur tað 284 fólk per lækna í Danmark.

Við at brúka læknatalið í Føroyum heldur enn ársverk uttan konsulentar, so eru tað í 2015 við 48.704 íbúgvum og 112 læknum, 435 íbúgvar fyri hvønn lækna í Føroyum. Ymiskir roknihættir vísa sostta somu mynd sum í NOMESCO 2012: at Føroyar hava eitt stórt læknatrot.

Samanbering við OECD tøl:
Miðaltalið av læknum í 28 ES londum var í 2012: 3,4 læknar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar (OECD, Health Care Resources and Activities, 2014).

Til samanberingar var talið í Føroyum ( grundað á NOMESCO í 2012): 2,3 læknar fyri hvørjar 1.000. Við tølum frá Hagstovuni vóru tað í 2012 tilsamans 100,6 sjúkrahúslæknar og kommunulæknaviðtalur, hetta gevur 2,1 læknar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Sama tal í 2015 í Føroyum er 2,3 læknar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Leggja vit so konsulentarnar aftrat, sv.t. 10 fulltíðarstørv, gevur hetta 2,5 læknar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar.

Av ES londum vóru tað í 2012 bert Pólland, Montenegro og Turkaland við ávikavist 2,2 - 2,0 og 1,7 læknum per 1.000, sum høvdu færri læknar, enn Føroyar høvdu í 2012. Føroyar høvdu á leið sama læknatal sum Rumenia, við 2,5, og Slovenia við 2,5 læknum per 1.000 íbúgvar.

Um Føroyar skuldu havt 3,4 læknar per 1.000 íbúgva, skuldu tað verið 166 læknar í Føroyum - tað eru 44 fleiri læknar enn tað vóru í august 2015, og 53 fleiri læknar enn tað sambært NOMESCO vóru í 2012 og **65,4** fleiri læknar, enn tølini hjá Hagstovu Føroya vístu í 2012.

Um læknatalið bert verður samanborið við onnur Norðanlond, er miðaltalið fyri Norðanlond 3,7 læknar per 1.000 íbúgva, (sjá tabell 3).

Health at a Glance (2014)

| Norra | Svøríki | Ísland | Danmark | Finnland | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|
| 4,2 | 3,9 | 3,6 | 3,5 | 3,3 | 3,7 |

Tabell 3: Læknar per 1.000 íbúgva, Kelda OECD, Health at a Glance 2014

Um Føroyar í 2012 skuldu havt 3,7 læknar per 1.000, skuldu tað verið 178 læknar í Føroyum. Hetta vil siga, at í Føroyum var eitt læknatrot uppá 65 sambært tølunum hjá NOMESCO, og har eru konsulentar íroknaðir (NOMESCO, 2012).

Við 48.704 fólkum í 2015 skuldu tað við 3,7 læknum per 1.000 verið 180 læknar í Føroyum, tað eru 68 læknar færri enn læknatalið í august 2015. Og rokna vit konsulentarnar við 58**.** Tá samanborið verður við tøl í Føroyum í 2015 skal atlit takast til, at læknatalið í ES londum er vaksið javnt síðan ár 2000 (OECD, Health Workforce, 2013), og tí kann væntast, at OECD læknatølini fyri 2015 verða hægri enn tølini fyri 2012.

# Niðurstøða um læknamanning í Føroyum samanborið við onnur lond

Tølini vísa, at Føroyar hevur eitt stórt trot á læknum. Trotið er sjónligt, bæði tá samanborið verður við Norðanlond og við ES sum heild, uttan mun til um vit samanbera tøl frá NOMESCO, sum inkludera konsulentar, ársverk frá Føroya Hagstovu ella læknatal frá læknafelagnum.

At Danmark hevur broytt roknihátt í 2014 broytir ikki støðuna, at tað eru væl fleiri læknar fyri hvønn íbúgva í Danmark samanborið við Føroyar.

Hvør lækni hevur 151 fleiri íbúgvar at taka sær av í Føroyum í mun til í Danmark, hóast tølini í Føroyum inkludera konsulentar.

Føroyar hava tørv á meira enn 53 læknum afturat, um vit skulu samanbera okkum við onnur Norðurlond. Afturat hesum kemur, at 6 kommunulæknastørv verða røkt av skiftandi avloysarum.

# Fíggingin av Føroyska Heilsuverkinum

Í uppgerðini hjá NOMECSO stendur OECD Health Statistics at vera keldan fyri flestu londini, tó ikki Grønland og Føroyar. Tølini hjá OECD eru roknað við at nýta SHA (System of Health Accounts) frymilin. SHA frymilin er gjørdur soleiðis, at øll lond í heiminum skulu kunna samanberast. Frymilin er sera neyvur og inkluderar heilsuútreiðslur frá bæði tí almenna og tí privata.

Sambært Hagstovu Føroya eru føroysku tølini framleidd við at brúka COFOG (Classification of the Functions of Government) frymilin. COFOG inkluderar bert almennar útreiðslur, og tí ber ikki til at samanbera føroysku tølini við tølini kunngjørd í NOMESCO.

Fyri at hava eitt samanberingar grundarlag eru COFOG tølini fyri Danmark, Norra, Svøríki í hesari uppgerðini brúkt at samanbera føroysku tølini við. OECD hevur ikki uppgivið COFOG tøl fyri Ísland og Finnland. Tølini eru umroknað til danskar krónur við árligum valuta frá Danmarks National Bank. Har er ikki tikið hædd fyri PPP í uppgerðini.

Heilsu útreiðslur sambært COFOG frymilin í mill. DKK

| | Føroyar | Danmark | Norra | Svøríki | UK |
|---|---|---|---|---|---|
| 2010 | 1.007 | 154.836 | 179.032 | 185.937 | 1.057.456 |
| 2011 | 1.048 | 156.052 | 193.602 | 205.905 | 1.050.916 |
| 2012 | 1.045 | 163.994 | 214.406 | 218.034 | 1.147.377 |
| 2013 | 1.083 | 164.512 | 219.286 | 227.601 | 1.144.145 |

Tabell 4: COFOG Heilsu útreiðslur í DKK, Kelda: Hagstova Føroya, OECD, Danmarks National Bank

Føroyar brúktu í 2013 1.083 mill kr. uppá heilsuverkið. Sama ár brúkti danska heilsuverkið kr. 164.512 mill. Í Danmark eru uml. 115 ferðir so nógv fólk sum í Føroyum. Um danir høvdu sama fólkatal sum í Føroyum, svara 164.512 mill. til kr. 1.426 mill. Hetta er **343** mill. meira, enn hvat Føroyar brúktu.

Um hædd verður tikin fyri fólkatalinum, brúktu Norra í 2013 2.138 mill. kr., tað er **1.055** mill kr. meira, enn hvat Føroyar brúktu.

Sviar brúktu í 2013 **71** mill. kr. meira enn føroyingar. Tað týdningarmikla við hesum tølunum er, at COFOG bert vísir almennu útreiðslurnar. Tann privati parturin í Føroyum er so mikið lítil, at roknast kann við, at munurin millum føroysku útreiðslurnar og útreiðslurnar í hinum norðan londunum hevði verið størri, um tað privata var tikið við. Privata virksemið í Danmark er í vøkstri, har fleiri og fleiri hava privatar sjúkratryggingar. Í Norra er privati marknaðurin ikki stórur, men hann er í vøkstri.

Niðanfyri í tabell 6 vísir COFOG heilsuútreiðslurnar, har hædd er tikið fyri munin í fólkatalinum. Umrokningartalið, ið er brúkt til hesar útrokningar, er eitt miðaltal fyri 2010-2013, tølini standa í tabell 5.

Fólkatalið dividerað við Føroyska fólkatalið, miðal 2010-2013

| Norra | Danmark | Svøríki |
|---|---|---|
| 102,6 | 115,2 | 197,2 |

Tabell 5: Umrokningar kvotientur fyri fólkatalið, Kelda Fólkatal: Føroyar: Hagstova Føroya, Danmark; Statistikbanken, Norra: Statistisk Sentral Byrå, Svøriki: SCB Statistiska centralbyrån, UK: Office for National Statistics

Heilsuútreiðslur í mill. um fólkatalið var sum í Føroyum og roknað um til DKK

| | Norra | Danmark | Svøríki | Føroyar |
|---|---|---|---|---|
| 2010 | 1.787 | 1.343 | 943 | 1.007 |
| 2011 | 1.888 | 1.353 | 1.044 | 1.048 |
| 2012 | 2.090 | 1.422 | 1.106 | 1.045 |
| 2013 | 2.138 | 1.426 | 1.154 | 1.083 |

Tabell 6: Heilsuútreiðslur í mun til føroyska fólkatalið, Kelda: Hagstova Føroya, OECD, Keldur Fólkatal: Føroyar: Hagstovan, Danmark: Statistikbanken, Norra: Statistisk Sentral Byrå, Svøriki: SCB Statistiska centralbyrån, UK: Office for National Statistics. Kelda valuta, Danmarks National Bank

Heilsuútreiðslur per capita vísa, at Føroyar í 2013 brúktu DKK 6.830 minni per høvd enn Danmark, 20.879 DKK minni enn Norra og DKK 1.065 minni per høvd enn Svøríki. Føroyar brúka minni per høvd uppá heilsuverkið enn øll hini norðurlondini ið uppgeva COFOG útreiðslur. Hetta hóast Føroyar vegna lágt íbúgvatalið ikki kunnu vænta samu effektivitet sum í stórum sjúkrahúsverkum og tí áttu at brúkt lutfalsliga meira uppá heilsuverkið til tess at vera á sama støði, sum t.d. Danmark.

Heilsuútreiðslur per capita í DKK við COFOG heilsuútreiðslum

| | Norra | Danmark | Svøríki | Føroyar |
|---|---|---|---|---|
| 2010 | 36.852 | 27.975 | 19.748 | 20.766 |
| 2011 | 39.327 | 28.064 | 21.713 | 21.632 |
| 2012 | 43.003 | 29.387 | 22.817 | 21.679 |
| 2013 | 43.412 | 29.363 | 23.598 | 22.533 |

Tabell 7: Kelda COFOG: Hagstova Føroya, OECD, Keldur Fólkatal: Føroyar: Hagstovan, Danmark: Statistikbanken, Norra: Statistisk Sentral Byrå, Svøriki: SCB Statistiska centralbyrån, UK: Office for National Statistics, Kelda valuta: Danmarks National Bank

SHA (System of Health Accounts) er vanligi frymilin, ið OECD lond nýta, tá ið tey uppgeva heilsuútreiðslur. SHA er ein annar frymil enn COFOG, og hendan kanningin hevur ikki SHA tøl at sipa til, tó kann sigast, at tað, sum vantar í fyri at føroysku tølini koma nær SHA er:

- Egingjald til tannlækna og heilivág
- Egingjald fyri lækna og fysioterapi
- Gjald til brillur, linsur og hoyritól
- Heilsuhjálpartól, so sum, sukurmátitól, blóðtrýsmátitól v.m.
- Privat gjald til serlæknar og privatar sjúkratryggingar

Summar heilsu útreiðslur hjá tí almenna eru ikki roknaðar við í COFOG, sum tó skulu teljast við í SHA. Hetta eru útreiðslur so sum: Heilsuútreiðslur til fólk ið bera brek, t.d. hjálpartól, ið bøta um heilsuna, (ikki bert lætta um lívið). Røktarútreiðslur, ið eru heilsugrundaðar, men ikki røktarpláss í sjálvum sær.

Á tabell 8 niðanfyri sæst munurin millum SHA og COFOG útreiðslur í mun til BTÚ.

COFOG/SHA Heilsuútreiðslur samanbornar við BTÚ í %:

| | Danmark | | Føroyar | | Norra | | Svøríki | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | COFOG | SHA | COFOG | SHA | COFOG | SHA | COFOG | SHA |
| 2010 | 8,6 | 10,4 | 7,8 | - | 7,4 | 8,9 | 6,8 | 8,5 |
| 2011 | 8,5 | 10,2 | 7,9 | - | 7,2 | 8,8 | 6,8 | 10,6 |
| 2012 | 8,8 | 10,4 | 7,7 | - | 7,3 | 8,8 | 6,9 | 10,8 |
| 2013 | 8,7 | 10,4 | 7,4 | - | 7,5 | 8,9 | 7,0 | 11,0 |

Tabell 8: Kelda, Hagstova Føroya, OECD

Føroyar brúktu í 2013, sambært COFOG frymilin, 7,4% av BTÚ uppá heilsuverkið í mun til 8,7% í Danmark, 7.5% í Norra og 7.0% í Svøríki. Við at hyggja eftir heilsuútreiðslum sum part av BTÚ kundi tað sæð út sum, at tað almenna í Norra brúkar áleið tað sama sum Føroyar. Men tá hugt verður eftir heilsuútreiðslum per capita sæst, at Norra brúkar 20.879 DKK meira enn Føroyar gera. Hetta er tí at BTÚ í Norra er so mikið høgt, at heilsuparturin minkar lutfalsliga. Tí er tað týdningarmikið at hyggja eftir tølunum frá ymiskum sjónarhornum.

Tølini í hesum útrokningunum vísa tó øll, at Føroyar brúka lutfalsliga minni uppá heilsuverkið enn hini norðurlondini, ið uppgeva COFOG, gera. Hetta hóast at Føroyar er eitt lítið land við einum lítlum heilsuverki, og tí áttu at brúkt lutfalsliga meira enn londini, ið samanborið er við, gera.

# Niðurstøða

Hendan kanningin vísir greitt, at Føroyar hevur tørv á fleiri læknum, um vit skulu samanbera okkum við onnur Norðanlond. Uttan mun til um roknað verður við læknaligum ársverkum, tal av læknum, við ella uttan konsulentum, er niðurstøðan tann sama:

- Tað mangla læknar í Føroyum.
- Bert Grønland hevur færri læknar per íbúgva enn Føroyar í Norðanlondum.
- Útrokningarnar vístu, at millum 44 og 68 læknar vanta í føroyska heilsuverkinum, umframt at 6 kommunulæknaviðtalur verða røktar av skiftandi avloysarum.
- Læknamanningin er sambært OECD (2013) í vøkstri kring heimin, og tí kann væntast, at munurin millum Føroyar og Norðurlond verður enn størri, enn samanberingin við nýggjastu tølini frá læknafelagnum vísa.

Tá ið heilsuútreiðslur verða samanbornar við onnur lond, er týdningarmikið at útreiðslurnar eru taldar saman við sama frymli. Í hesari kanningini eru COFOG tøl frá OECD funnin til samanberingargrundarlag. Ikki øll Norðanlond uppgeva COFOG útreiðslur, av tí at SHA-frymilin er tann, ið vanliga verður nýttur. Útrokningarnar vísa, at Føroyar í 2013 brúktu **343** mill kr. minni uppá heilsuverkið enn Danmark brúktu, tá hædd var tikin fyri fólkatalinum, og nærum helvtina minni enn hvat Norra brúkti. Svøríki brúkti bert 71 mill kr. meira enn Føroyar. Men tað er týdningarmikið at taka hædd fyri, at COFOG bert inkluderar almennar útreiðslur, og tí skal ein vera varin, tá ið COFOG útreiðslur vera samanbornar.

Um hugt verður eftir útreiðslum per capita, so brúka norðmenn kr. 20.879 meira til hvønn íbúgva uppá heilsuverkið, enn føroyingar gjørdu. Danmark brúkti 6.830 kr. meira fyri hvønn íbúgva og Svøríki 1.065 kr. meira fyri hvønn íbúgva, enn Føroyar brúkti.

Tað er dýrari at reka eitt lítið heilsuverk enn eitt stórt, og tí áttu Føroyar at brúkt lutfalsliga meira uppá heilsuverkið enn onnur lond fyri at halda sama støði.

Útrokningarnar í hesari kanning vísa, at Føroyar brúka munandi minni í heilsuútreiðslum, enn onnur lond í kanningini gera.

# Keldulisti


Danmarks Statistik (2015). *Befolkning efter område og socioøkonomisk status,* Danmarks Statistik: http://www.statistikbanken.dk/NRHB 13.07.2015

Hagstova Føroya. (2015). *Heilsumál*, Størv á sjúkrahúsunum (2000-2014), 22.05.2015, Hagstova Føroya: http://www.hagstova.fo/fo/hagtalsgrunnur/livikor/heilsumal, retrieved 07.2015

Hagstova Føroya. (2015). *Heilsumál*, Kommunulæknar og tannlæknar í tali (1999-2014), 19.05.2015, Hagstova Føroya: http://www.hagstova.fo/fo/hagtalsgrunnur/livikor/heilsumal, retrieved 07.2015

Hagstova Føroya. (2015). *Tjóðarroknskapur*, Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum (1998-2013), 25.02.2015, Hagstova Føroya: http://www.hagstova.fo/fo/hagtalsgrunnur/tjodarroknskapur/tjodarroknskapur/hovudstol, retrieved 07.2015

Nationalbankens Statistikbank: (2015), *Valuta kurser*, DNVALA: Valutakurser efter valuta, kurstype og opgørelsesmetode (årsobservationer), Danmarks National Bank: http://nationalbanken.statistikbank.dk/nbf/100249, retrieved 08.2015

Nomesco. (2014). *Health Statistics in the Nordic Countries 2014,* Copenhagen: Nordic Medico-Statistical Committee.

OECD. (2013). *Health at a Glance 2013: OECD Indicators,* OECD Publishing: http://dx.doi.org/10.1787/health_glance-2013-en, retrieved 27.05.2015

OECD. (2014). *Health at a Glance: Europe 2014,* Health Care Resources and Activities, OECD Publishing.

OECD.(2015) *Health expenditure and Financing,* OECD.STAT: https://stats.oecd.org/Index.aspx?DataSetCode=SHA

OECD. (2013). Health Workforce, Doctors overall number. *Health at a Glance 2013,* OECD Publishing.

OECD. (2015). *Level of GDP per capita and productivity.* OECD.STAT: https://stats.oecd.org/Index.aspx?DataSetCode=PDB_LV, retrieved 30. 07 2015

Statistics Iceland (2014) *Health Services,* Health Personnel 1981-2013, Statistics Iceland: http://www.statice.is/?PageID=1283&src=https://rannsokn.hagstofa.is/pxen/Dialog/varval.asp?ma=HEI04101%26ti=Health+personnel+1981%2D2013+%26path=../Database/heilbrigdismal/heilbrigdisthj/%26lang=1%26units=Number/number of inhabitants per employee, retrieved 07.2015

Statistiska centralbyrån (2015) *Sveriges folkmängd (i ettårsklasser) 1860-2014, SCB*

Statistiska centralbyrån - enheden for befolkningsstatistik*: http://www.scb.se/sv_/Hitta-statistik/sok/?query=folkm%c3%a4ngd&ss=True&searchfv=32 retrieved 13.07.2015*

Statistisk Sentralbyrå (2015). *Folkemengde*, Tabell 04317 Folkemengde, etter grunnkrets, Statistisk Sentralbyrå: https://www.ssb.no/statistikkbanken/selectvarval/saveselections.asp, retrieved 13.07.2015

The World Bank, (2015), *GDP per Capita (Current US $*), The World Bank Group: http://data.worldbank.org/indicator/NY.GDP.PCAP.CD/countries/FO?display=graph, retrieved 25.08.2015

Trier-Poulsen, D. & Facius, K. (2015). *Sundhedsvæsnets arbejdsmarked*, 27.01.2015, Statens Serum Institut: http://www.ssi.dk/Sundhedsdataogit/Sundhedsvaesenet%20i%20tal/Sundhedsvaesenets%20arbejdsmarked.aspx, retrieved 15.07.2015

Trier-Poulsen, D. & Facius, K. (2015). *Sundhedsvæsnets arbejdsmarked,* ydere inden for praksis sektoren 20.05.2015, Statens Seruminstitut: http://www.ssi.dk/Sundhedsdataogit/Sundhedsvaesenet%20i%20tal/Sundhedsvaesenets%20arbejdsmarked/Ydere%20indenfor%20praksissektoren.aspx, retrieved 03.08.2015

# APPENDIX

COFOG sum % av BTÚ

| 2010 | Føroyar DKK | Danmark DKK | Norra NKR | Svøríki SKR | UK GBP |
|---|---|---|---|---|---|
| GDP í mill, egið valuta | 12.942 | 1.798.649 | 2.590.089 | 3.519.994 | 1.558.365 |
| COFOG í mill, egið valuta | 1.007 | 154.836 | 192.475 | 237.916 | 121.684 |
| COFOG sum % av GDP | 7,8% | 8,6% | 7,4% | 6,8% | 7,8% |
| **2011** | **Føroyar DKK** | **Danmark DKK** | **Norra NKR** | **Svøríki SKR** | **UK GBP** |
| GDP í mill, egið valuta | 13.254 | 1.833.404 | 2.791.973 | 3.656.577 | 1.617.677 |
| COFOG í mill, egið valuta | 1.048 | 156.052 | 202.384 | 249.520 | 122.334 |
| COFOG sum % av GDP | 7,9% | 8,5% | 7,2% | 6,8% | 7,6% |
| HCE | | 8,3% | 6,7% | 8,8% | 9,3% |
| **2012** | **Føroyar DKK** | **Danmark DKK** | **Norra NKR** | **Svøríki SKR** | **UK GBP** |
| GDP í mill, egið valuta | 13.650 | 1.866.779 | 2.965.208 | 3.684.800 | 1.655.384 |
| COFOG í mill, egið valuta | 1.045 | 163.994 | 215.222 | 254.645 | 124.936 |
| COFOG sum % av GDP | 7,7% | 8,8% | 7,3% | 6,9% | 7,5% |
| **2013** | **Føroyar DKK** | **Danmark DKK** | **Norra NKR** | **Svøríki SKR** | **UK GBP** |
| GDP í mill, egið valuta | 14.678 | 1.886.393 | 3.068.801 | 3.775.016 | 1.791.934 |
| COFOG í mill, egið valuta | 1.083 | 164.512 | 229.160 | 263.924 | 130.292 |
| COFOG sum % av GDP | 7,4% | 8,7% | 7,5% | 7,0% | 7,3% |

COFOG Útrokningar

| 2010 | Føroyar DKK | Danmark DKK | Norra NKR | Svøríki SKR |
|---|---|---|---|---|
| Valuta Kurs DKK | 100 | 100 | 93,0159 | 78,1525 |
| Heilsuútreiðslur sambært COFOG í mill | 1.007 | 154.836 | 192.475 | 237.916 |
| Kurs regulerað | | | 179.032,4 | 185.937,3 |
| Fólkatalið | 48.494 | 5.534.738,0 | 4.858.199 | 9.415.570 |
| Fólkatalið býtt við tað Føroyska | | 114,1 | 100,2 | 194,2 |
| Heilsu útreiðslur í mun til FO Fólkatal | | 1.342,5 | 1787,1 | 942,9 |
| COFOG heilsuútreiðslur per capita | 20.765,5 | 27.975,3 | 39.618,6 | 25.268,4 |
| Per kapita kursregulerað | 20.765,5 | 27.975,3 | 36.851,6 | 19.747,8 |
| **2011** | **Føroyar DKK** | **Danmark DKK** | **Norra NKR** | **Svøríki SKR** |
| Valuta Kurs DKK | 100 | 100,0 | 95,6115 | 82,5205 |
| Heilsuútreiðslur sambært COFOG í mill | 1.048 | 156.052,0 | 202.384 | 249.520 |
| Kurs regulering | 1.048 | 156.052,0 | 193.602,40 | 205.905,20 |
| Fólkatalið | 48.447 | 5.560.628,0 | 4.920.305 | 9.482.855 |
| Fólkatalið býtt við tað Føroyska | | 114,8 | 101,6 | 195,7 |
| Heilsu útreiðslur í mun til FO Fólkatal | | 1.353,1 | 1887,54 | 1044,13 |
| COFOG heilsuútreiðslur per capita | 21.631,90 | 28.063,7 | 41.132,40 | 26.312,80 |
| Per kapita kursregulerað | 21.631,90 | 28.063,7 | 39.327,30 | 21.712,79 |

| 2012 | Føroyar DKK | Danmark DKK | Norra NKR | Svøríki SKR |
|---|---|---|---|---|
| Valuta Kurs DKK | 100 | 100,0 | 99,6208 | 85,6229 |
| Heilsuútreiðslur sambært COFOG í mill | 1.045 | 163.994,0 | 215.222 | 254.645 |
| Kurs regulering | 1.045 | 163.994,0 | 214.405,90 | 218.034,40 |
| Fólkatalið | 48.204 | 5.580.516,0 | 4.985.870 | 9.555.893 |
| Fólkatalið býtt við tað Føroyska | | 115,8 | 103,4 | 198,2 |
| Heilsu útreiðslur í mun til FO Fólkatal | | 1.421,9 | 2090,37 | 1105,64 |
| COFOG heilsuútreiðslur per capita | 21.678,70 | 29.386,9 | 43.166,40 | 26.648 |
| Per kapita kursregulerað | 21.678,70 | 29.386,9 | 43.002,71 | 22.817 |
| **2013** | **Føroyar DKK** | **Danmark DKK** | **Norra NKR** | **Svøríki SKR** |
| Valuta Kurs DKK | 100 | 100,0 | 95,6912 | 86,2374 |
| Heilsuútreiðslur COFOG í egið valuta í mill | 1.083 DKK | 164.512,0 | 229.160 | 263.924 |
| Kurs regulering | 1.083.000.000 | 164.512.000.000 | 219.286 | 227.601,20 |
| Fólkatalið | 48.062 | 5.602.628,0 | 5.051.275 | 9.644.864 |
| Fólkatalið býtt við tað Føroyska | | 116,6 | 105,1 | 200,7 |
| Heilsu útreiðslur í mun til FO Fólkatal | | 1.426,4 | 2137,9 | 1154,15 |
| COFOG heilsuútreiðslur per capita | 22.533,40 | 29.363,4 | 45.366,80 | 27.364,20 |
| Heilsuútr. pr capita, kursregulerað | 22.533,40 | 29.363,4 | 43.412,00 | 23.598,18 |
| Miðal Indeks | | 115,3 | 102,6 | 197,2 |

Læknatalið sambært tøl frá Hagstovu Føroya:

| Ár | Kommunulæknar/ viðtalur | Sjúkrahús læknar | Í alt | Fólkatal: 1.000 | Læknar per 1.000 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2000 | 27 | 56,5 | 83,5 | 45,3 | 1,84 |
| 2011 | 27 | 67,2 | 94,2 | 48,4 | 1,95 |
| 2012 | 27 | 73,6 | 100,6 | 48,2 | 2,09 |
| 2013 | 29 | 76,4 | 105,4 | 48,1 | 2,19 |
| 2014 | 30 | 79,6 | 109,6 | 48,2 | 2,27 |